# Kapitalvinningssjálvuppgáva – feløg

TAKS

**Ár:**

Navn: V-tal:

Gøta og nr.:

Postnr.: Bygd/býur:

Sambært løgtingslóg nr. 164 frá 21. desember 2001 (Kapitalvinningsskattalógini), sum hevur virknað frá 16. november 2001, geva undirritaðu upp eftir bestu sannføring okkara, at vinningur/tap okkara í árinum, sum sjálvuppgávan er fyri, hava verið hesi:

| | | Felagið: | Skattavaldið: |
|---|---|---|---|
| 1. | Vinningur ella tap av partabrøvum v.m. | | |
| 2. | Vinningur ella tap av fíggjarkrøvum og skuld | | |
| 3. | Vinningur ella tap av keyps- og sølurættindum | | |
| 4. | Vinningsbýti frá føroyskum feløgum | | |
| 5. | Vinningsbýti frá útlendskum feløgum | | |
| 6. | Hall frá eldri árum | | |
| 7. | Hall flutt frá P/F sjálvuppgávu | | |
| **Tilsamans** | | | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 21. | Goldin skattur av vinningsbýti frá føroyskum feløgum | | |
| 22. | Skattur goldin uttanlands (skjalprógv skal leggjast við) | | |
| **Goldin skattur tilsamans** | | | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 30. | Vinningsbýti frá atknýttum feløgum | | |

**Útgreining til punkt 1:**

| Felag: | Útveganardagf. | Útveganarupph. | Søludagf. | Søluupph. |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |
| | | | | |

Hendan sjálvuppgávan skal latast inn eftir somu freistum sum vanliga sjálvuppgávan.

Henda uppgerð er eftir bestu sannføring okkara og undir sektarábyrgd eftir reglunum í §§ 23-25 í kapitalvinningsskattalógini.

.................................... , tann / 20 .... ....................................................

Undirskrift og stempul

**S43** **171208**

# Vegleiðing til kapitalvinningssjálvuppgávuna

Kapitalvinningsskattalógin hevur virknað fyri vinning og tap, sum er staðfest 16. november 2001 ella seinni. Eisini hevur lógin virknað fyri rentuinntøkur, sum eru tilskrivaðar og fyri vinningsbýti, ið er útlutað 16. november 2001 ella seinni.
Hevur skattgjaldarin vinning ella tap av partabrøvum, íløguprógvum og líknandi virðisbrøvum eins og av umbýtiligum lánsbrøvum, har vinningurin ella tapið er staðfest 16. november 2001 ella seinni, men har hesi virðisbrøv eru útvegað áðrenn 16. november 2001, eru serligar skiftisreglur galdandi fyri skatting av vinningi ella tapi. (§§ 27-30)

Niðanfyri er vegleiðing til, hvussu tey ymsu punktini í kapitalvinningssjálvuppgávuni skulu útfyllast:

**1.** Vinningur ella tap av partabrøvum, íløguprógvum og líknandi virðisbrøvum eins og umbýtiligum lánsbrøvum skal roknast við í uppgerðina av kapitalvinningsinntøkuni jbr. § 4. Um eitt felag selur partabræv í einum dótturfelag, og hevur tap av hesi sølu, kann móðirfelagið bert draga tapið frá í uppgerðini av kapitalvinningsinntøkuni, í tann mun tapið er størri enn skattafrítt vinningsbýti, sum felagið hevur fingið av avvarðandi virðisbrævið jbr. §4, stk. 3.
Um virðisbrøvini verða seld til felagið, sum hevur givið út virðisbrævið, skal avhendingarupphæddin roknast fyri vinningsbýti (skal uppgevast í pkt. 5 ella 6) jbr. § 5, stk. 1. Tó kann Toll- og Skattaráð Føroya loyva, at avhendingarupphæddin í staðin verður viðgjørd sum við vanligari sølu, jbr. § 5, stk. 2. Um avhendingin til útgevandi felagið fer fram í tí kalendaraári, tá útgevandi felagið er endaliga avtikið, skal avhendingarupphæddin eisini verða viðgjørd sum við vanligari sølu, jbr. § 5, stk. 3.

**2.** Tap kann bert roknast við í uppgerðini av kapitalvinningsinntøkuni, um talan er um tap av lánsbrøvum, skuldarbrøvum og pantibrøvum, ið eru skrásett á virðisbrævamarknaði, jbr. § 6, stk. 4. Tap av skuldarum og tap av viðurlagsvinnu verða viðgjørt eftir reglunum í skattalógini, og skulu tí ikki roknast við í uppgerðina av kapitalvinningsinntøkuni, § 6, stk. 5. Sama er galdandi fyri valutakurstap av fíggjarkrøvum og skuld, ið hava samband við vinnuvirki, § 6, stk. 6. Vinningur ella tap við eftirgeving, fyrning, samanrenning, fyrilokan av skuld og orsakað av neyðskuldarsemju og sjálvbodnari skuldarsemjuverða roknað við í uppgerðina av kapitalvinningsinntøkuni í tann mun, skuldin verður niðurskrivað niður um kursvirðið á kravinum fyri kravánaranum, tá skuldin varð eftirgivin v.m., jbr. § 7. Undantak frá hesum er tó, um eftirgeving v.m. er gáva, arvaforskot ella arvur frá hjúnarfelaga, avkomi, foreldrum (heruppií ættleiðingarforeldrum) ella abba og ommu. Tá skal vinningur ikki roknast við í uppgerðina av kapitalvinningsinntøkuni, jbr, § 7, stk. 2.

**3.** Vinningur ella tap av keyps- og sølurættindum til partabrøv, íløguprógv og líknandi virðisbrøv og fíggjarkrøv skal roknast við í uppgerðina av kapitalvinningsinntøkuni, jbr. § 8.

**4. og 5.** Vinningsbýti skal roknast við í uppgerðina av kapitalvinningsinntøkuni, jbr. § 9. Feløg og grunnar o.o., sum eru fullt skattskyldug í Føroyum og sum eiga partapening ella innskotspening í tí útlutandi felagnum, skulu ikki gjalda skatt av vinningsbýtinum jbr. § 9, stk. 1. Skattur skal ikki latast av vinningsbýti til partabrøv/innskotsprógv, sum tað útlutandi felagið sjálvt eigur. Sjálvt um skattur av vinningsbýti er hildin aftur og goldin av felagnum, sum útlutar vinningsbýti, so skal vinningsbýti uppgevast.

**6.** Hall frá eldri árum kann flytast fram í 5 ár, jbr. §§ 14 og 31.

**7.** Feløg, sum í inntøkuuppgerðini eftir skattalógini hava hall, kunnu draga hallið frá í kapitalvinningssjálvuppgávuni.

**21.** Goldin skattur av vinningsbýti. Her er talan um tann skatt, sum feløg hava hildið aftur og goldið skattgjaldarans vegna.

**22.** Skattur goldin uttanlands. Her er talan um møguligan skatt, sum er goldin uttanlands, av tí at vinningurin eisini er skattskyldugur uttanlands.
Sambært § 19 í kapitalvinningsskattalógini kann skattur, sum er goldin øðrum landi, verða driginfrá í tí skatti, sum latin skal verða í Føroyum av hesi inntøku. Eisini kann verða talan um tvískattasáttmála, sum heimilar frádrátt í føroyska skattinum fyri skatt, sum er goldin í øðrum landi.
Skjalprógv fyri goldna skattin uttanlands skal leggjast við sjálvuppgávuni.

**30.** Vinningsbýti frá atknýttum feløgum, t.e. útlutandi feløg, sum felagið eigur 25% ella meira av partapeninginum skal uppgevast her.